Samarittarnir klárir til summarið

–Tað gevur nakað, tí tú merkir, at tú veruliga hevur møguleikan fyri at hjálpa, sigur ein av samarittunum hjá Reyða Krossi, ið eru klárir at hjálpa, tá størri tiltøk eru á skránni.

Samarittarnir hjá Reyða Krossi eru fólk, ið sjálvboðin arbeiða fyri tí eina endamáli: at hjálpa øðrum. Í summar ætla tey sær kring landið til stevnur og størri tiltøk, har tey kunnu vera við til at gera tiltøkini tryggari fyri fjøldina

SAMARITTAR
Orð og Myndir: Heri á Rógvi

Tórshavn: Í 10. kapitli í Evangelinum eftir Lukas hoyra vit um hin miskunnsama sámáriubúgvan. Hesin miskunnsami, sum røktaði tann hálvdeyða mannin, eigur íblásturin til ein bólk undir Reyða Krossi, sum ógvuliga passandi kalla seg fyri samarittir. Teirra eina endamál er at hjálpa øðrum.

Samarittar eru kendir úr okkara grannalondum og í fleiri øðrum londum í Evropa, og teir stinga seg javnan upp í størru tiltøkum. Eisini í Føroyum eru fólkini í teimum skyggjandi reyðu jakkunum vorðin fastur táttur til nøkur tiltøk.

Mikukvøld

Dagin fyri var val í Føroyum. Dagarnir hjá nøkrum hava verið drúgvir. Tó eru tey ótroyttilig hjá Reyða Krossi. Tað er nevniliga mikukvøld, at tey hittast til ein fund. Ein fundur er kanska ikki rætta orðið, tí tey meira hittast enn fundast. Tað er ymiskt, hvat tey taka sær til hesi kvøldini. Tey vitja kanska á alnetinum, tosa um tiltøk ella kanska hyggja eftir og kunna seg um útbúnaðin, ið tey eiga heilt fitt av.

Tað stendur heldur ikki á at fáa tey at tosa, tí hetta er nakað, ið tey týðuliga hava áhuga fyri og fegin vilja tosa um.

Føroysku samarattarnir eru eini 14, sum eru aktivir. Samalaða limatalið liggum um tjúgu. Aldurin er ymiskur: Frá átjan til nakað omanfyri hálvtrýs. Alt byrjaði við, at ein bólkur var farin á fyrstahjálpara skeið, har teir frættu um samaritarbeiðið. Formaðurin í Reyða Krossi fekk teir oman at vitja, og tað gekk ikki rúm tíð, áðrenn teir játtaðu at vera við. Tað eru tvey ár síðani, at teir fyrstu í Føroyum kundu kalla seg samarittar.

Fyri at vera við og kunna kalla seg fyri samarit, so er neyðugt, at tú entin hevur ella tekur skeið sum fyrstihjálpari. Fyrsta árið í felagsskapinum verður eisini nýtt sum fyrsta hjálpari, har tú fært góðan stuðul frá hinum samarittunum. Munur verður kortini ikki gjørdur á fólki, og eingin er omanfyri nakran annan, men talan er bert um at læra fólk upp.

Eftir hetta eina árið kanst tú lata teg í reyða jakkan sum samarittar. Sjálvbodnu hjálpararnir leggja tó stóran dent allatíðina at gerast betri og at taka fleiri skeið. Umframt vanliga fyrsta hjálpara skeiðið, so er eisini eitt víðkað skeið, skeið í sálarligari fyrstuhjálp og onnur samarittaskeið at taka. Við nýggjum tólum og við fleiri tiltøkum gerst tørvurin á skeiðum eisini størri, men áhugin er til staðar.

Í fjør summar sluppu nakrir av føroysku samarittunum at royna seg sum samarittar á Roskilde Festivalinum, sum nýtir nógvar samarittar.

Hjálpa

Sum samarittur er tú hvørki lækni ella sjúkrasystir, men ein, sum er klárur at hjálpa, tá okkurt er áfat. Fólk, sum eru komin illa fyri til tiltøk, verða hjálp av samarittunum, sum kunnu taka sær av sárum ella øðrum við teirra útgerð. Tey hava fyri ikki so langari tíð síðani fingið nýggja útgerð, sum gevur teimum møguleikan at hjálpa fólkið, ið hava fingið okkurt skeivt fyri í hálsinum. Hetta krevur aftur eitt skeið, men trúgvu samarittarnir slúka hetta sum øll onnur skeið, tey taka.

Samarittar eru vanliga við til størri tiltøk, sum konsertir, festivalar og ítróttarhendingar. Eitt nú hevur FIFA(altjóða fótbóltssambandið) sett sum krav, at samarittar skulu vera til staðar, tá dystir eru á skránni.

Fyri at vera samarittar skalt tú vera fyltur átjan ár. –Vit eru framvegis á byrjunarstøði, men vit mennast allatíðina, ljóðar tað frá einum av nýggju, sum eru komin oman í hølini í Vágsbotni hetta mikukvøldið.

Sum sagt er alt arbeiði sjálvboðið.Vinningurin er fyri tað nógva tað sosiala, men tað byggjar eisini á meira enn bert hetta.

–Tað gevur nakað, tí tú merkir, at tú veruliga hevur møguleikan fyri at hjálpa, sigur ein teirra. Tað er eisini breið semja um, at grundarsteinurin er at veita hjálp.

–Tú verður bitin av tí, tá tú fyrst kemur ígong, sigur ein og øll samtykkja.

Ætlanin er, at virksemið hjá samarittunum skal hvíla í sær sjálvum. Tá tey luttaka við nøkur tiltøk, so taka eina samsýning fyri arbeiðið. Allir pengarnir, ið tey fáa inn, verður nýttur til at keypa útbúnað, og hetta kostar eisini. Tey nevna í hesum sambandi, at tey eisini hava fingið góðan stuðul og møt vælvild frá nøkrum fyritøkum. Føroya Sparikassi og Tryggingarfelagið Føroyar hava stuðlað við keyp av útgerð.

Ætlanin hjá føroysku samariubúgvunum er at skipa arbeiðið í fastar avtalur. At skipa tað soleiðis, at tey javnan eru við til tiltøk, og tey vera sett á skránni fast, eisini tí tað skal planleggjast.

Tað besta hevði verið, siga tey, at havt tvey lið, ið so høvdu kunnað skift um at verið úti.

Seinastu tíðina hava tey merkt eina ávísa tilgond, men tey síggja fegin, at fleiri enn koma við, tí tað er pláss fyri nógv fleiri. Einki krav er annað enn tey fyrr nevndu um viljan til at hjálpa og aldur.

Tey, ið hava hug at vera við, kunnu seta seg í samband við Reyða Kross ella Leif Dam á telefonnummar 310149.

Samarittarnir hjá Reyða Krossi hava tørv á nógvari útgerð. Ætlanin hjá teimum er at fáa arbeiða skipað í eina meira fastu legu.

Næmingar á studentaskúla:

– Finna seg ikki í at vera kastibløkur

Fríggjamorgunin fóru um 100 nærmingar úr Studentaskúlanum á Hoydølum á eina mótmælisgongu móti Mentamálastýrið. Tey finna seg ikki í, at flokkarnir eftir eitt heilt skúlaár nú skulu leggjast saman

ÚTBÚGVING
Ragnhild Ellingsgaard

Fríggjamorgunin klokkan 10.30 fóru um 100 næmingar úr Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Hoydølum til gongu. Leiðin lá móti Mentamálastýrinum, har tey vildu handa Óla Holm, landsstýrismanni í Mentamálaráðum, eitt skriv. Á hesum skrivið mótmæltu tey ætlanunum hjá Mentamálastýrinum um at leggja flokkar á skúlanum saman, og høvdu tey øll sett sína undirskrift á skrivið.

Flokkur býtast

Næmingarnir umboðaðu 1. árs næmingar á Studentaskúlanum, og vóru bæði málsligir og matematiskir næmingar til staðar.

Tey hava fyri stuttum fingið boð um, at Mentamálastýrið, orsakað av sparingum, hevur ætlanir um at leggja teir fýra matematisku flokkarnar niður í tríggjar tað komandi skúlaárið. Hetta merkir við øðrum oðrum, at tann eini flokkurin skal býtast sundur, soleiðis at tað einans verða tríggjar matematiskir flokkar komandi skúlaár.

Men hesum vilja næmingarnir ikki finna seg í.

Tey vilja hava Mentamálaráðið at skilja, at samanhaldið í flokkinum hevur nógv at siga fyri trivnaðin hjá hvørjum einstøkum næmingum, og longu eftir fyrsta skúlaárið er samanhaldið vorðið so mikið gott, at sundurslítingin uttan iva kemur at ávirka skúlagongdina.

Harumframt hava hinir tríggir flokkarnir eisini skapt sær eitt samanhald, sum tað verður torført hjá nýggjum næmingum at sleppa uppí.

- Hetta seinasta skúlaárið hava vit fingið vinir í flokkinum, og vit trívast væl. Men um flokkurin skal býtast sundur í tríggjar partar, so standa vit einsamøll í einum nýggjum flokki. Og tað kemur sjálvandi at ávirka trivnaðin hjá okkum, sigur Halla Ellefsen, sum gongur í tí flokkinum, sum eftir ætlan skal býtast sundur.

Tískil fóru tey eina mótmælisgongu til Mentamálastýrið, har tey handaðu eitt mótmælisskriv.

Verður viðgjørt

Ætlanin var at handa Óla Holm mótmælisskrivið, men hann var ikki til staðar hendan morgunin. Ístaðin tók Petur Petersen móti skrivinum, og hann skuldi síðan lata tað til viðgerðar. Men hóast skrivið verður latið til viðgerðar, so hevði hann ongan stórvegis ugga at bera næmingunum.

- Hann segði, at vit ikki skuldu vænta, at avgerðin verður broytt. Teir hava ikki ráð til annað, og tí var minimalur kjansur fyri, at flokkarnir verða verandi, sum teir eru í dag, greiðir Halla frá.

Hví so skal vera, skilja næmingarnir ikki rættiliga. Teir hava fingið at vita, at tað fleiri ferðir er vorðið staðfest, at fólk hava ringar royndir við at leggja flokkar saman

Seinasta ár varð ein flokkur á Kamsdali lagdur saman við øðrum, og fyri nøkrum árum síðani hendi tað sama eisini á Hoydølum.

- Samanleggingar henda alt for ofta, og tað líkist ongum, heldur Halla.

Ístaðin heldur hon, at Mentamálastýrið skuldi lært seg at raðfest peningin øðrvísi, soleiðis at trivnaðurin hjá næmingum eisini hevði okkurt at siga.

Hetta eru góð skip

- Farið verður til fiskiskap sum skjótast, sigur Kjartan Joensen, sum eigur nýggja trolbátin, Norðleiv

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Hóskvøldið komu nýggju trolbátarnir hjá Kjartani Joensen og Osmundi Justinussen, Norðleivur og Fríðborg, á Leirvík (sí grein aðrastaðni í blaðnum).

Bátarnir eru bygdir á Ósey á Havnafjørðinum í Íslandi, men skrokkarnir eru bygdir í Póllandi.

Kjartan Joensen sigur, at veðrið á ferðini heim úr Íslandi var eitt sindur ruskut, men bátarnir royndust væl í sjónum.

- Vit eru væl nøgdir við bátarnar og halda eisini, at apeteringin er óføra góð. Hetta er eitt stórt framstig hjá manningini.

Spurdur, um skipini ikki tykjast lág aftan í mun til framman, sigur Kjartan, at hæddin á bakkanum hevur nakað við apeteringina at gera.

Eini 300 fólk tóku ímóti Norðleivi og Fríðborg og bryggjuni í Leirvík hóskvøldið

- Hetta eru jú smá skip, har apteringin og harvið umstøðurnar hjá manningini hava høgan prioritet, sigur hann.

Klárir at loysa

Manningin, sum verður við Norðleivi og Fríðborg, er hin sama, sum var við bátunum, ið hesir báðir nú skulu loysa av.

Norðleivur kemur í flotan fyri gamla Norðleiv, sum er fyrrverandi Stigabarmur, og Fríðborg kemur fyri Raðhamar.

Kjartan sigur, at bátarnir eru klárir at fara til fiskiskap, men enn eru onkur skjøl at avgreiða, og eitt nú skulu bátarnir lóggildast av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

- Eg vænti, at loyst verður hesumegin hvítusunnu. Men dregur tað eitt sindur út við pappírunum, verður loyst beint eftir hvítusunnu, leggur hann aftrat.

Norðleivur og Fríðborg eru 19,40 metrar langir og 5 metrar breiðir. Maskinurnar eru 425 hk.

Bæði Norðleivur og Fríðborg sleppa á landleiðina at royna, táið trolbátarnir sleppa at fiska innanfyri.

kei
a talan su lei slua b
r truplu sa talur ei arin su lei beinari
n a l sk n r at st rk a førl kan l ttakar n at
r ka sa tal na s rof ss on lt a o sk tr l stø .
Talan kann t. . ra at okk rt a r k r o nal gt ar sl ga at s ga
n t l sókn r star nóg r s kra agar alko oltr ll kar sagn r
o.a.
sk n r r ar tt fra løg sa tal og rakt sk
n ng nn al a o tøk r.
k n r s r t l st órar og l arar star sfólka rg .
k sl arar r nn l ss larfrø ngarn r
kola nø og Jan ll o s.
k r føro sk og onsk .
k r r l 1 . 1. n ot l g s nt rnatsk .
k r na t l 1 l ttakarar.
k sl slan sk lar s r r tt t l s l at s ta sk sl ttakar ólk n sa an
ostna r f r sk r .500 00 kr. øll
T l ng fra t l na ag n . a t l ost ll ost.ol ant.fo
ar r a s n l ttakar n k 3 sa an n al g skr nn rof l og
l ttakaral sta.
nsk a t g at ta ra sk r ng t l Jan ll o s tlf. 1 15 0
WILLEMOES PROCONSULT